# Løgmansskrivstovan

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 27.09.2021 |
| Mál nr.: | 21/18020 |
| Málsviðgjørt: | NF/SR |
| Ummælisfreist: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í ymsum lógum vegna avtøku av heftisrevsing o.a.**
(Heftirevsing broytt til fongsul í upp til 4 mánaðar)

**§ 1**

Í lov nr. 81 af 30. marts 1895 for Færøerne om tilsyn med udvandreres befordring, sum broytt við § 6 í lov nr. 127 af 15. april 1930 og § 5 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 16 orðað soleiðis:

"**§ 16.** Um ikki hægri revsing er ásett sambært aðrari lóggávu, verða brot á hesa lógina revsaði við sekt, tó so at brot á § 1 kann hækka til fongsul í 2 mánaðar. Sektir fella til ríkiskassan."

**§ 2**

Í lov nr. 49 af 24. marts 1899 om Strandingslov for Færøerne, sum broytt við § 6 í lov nr. 127 av 15. april 1930 og § 7 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 19, stk. 1 "hæfte eller" strikað.

**§ 3**

Í lov nr. 127 af 15. april 1930 om ikrafttræden af borgerlig straffelov, sum broytt við lov nr. 133 af 7. maj 1937, lov nr. 88 af 15. marts 1939, lov nr. 165 af 31. maj 1961, lov nr. 89 af 29. marts 1972, lov nr. 320 af 13. juni 1973, lov nr. 268 af 26. juni 1975, § 10 í konglig anordning nr. 272 af 14. maj 1986 og konglig anordning nr. 582 af 23. juni 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** §§ 5, 10, 19 og 20 verða strikaðar.

**2.** Í § 7, stk. 2 verður "Hæfte eller" strikað.

**3.** Í § 7, stk. 3 verður orðað soleiðis: "*Stk. 3.* Í staðin fyri vanligt fongsul kemur fongsul í upp til 4 mánaðar."

**4.** § 11, stk. 2 og 3 og § 18, stk. 4 verða strikaðar.

**5.** 3die Kapitel verður strikaður.

**6.** Í § 17, stk. 1 verður “Hæfte” broytt til: “fængsel”.

**§ 4**

Í anordning nr. 49 af 19. februar 1934 for Færøerne om Gifte og andre for Sundheden farlige Stoffer, sum broytt við § 19 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 15, stk. 1 “til Hæfte eller” strikað.

**§ 5**

Í lov nr. 139 af 7. maj 1937 om Kontrol med Tilvirkning af Krigsmateriel m.m., sum broytt við § 22 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 11, stk. 1, 1. pkt. “eller Hæfte” strikað.

**§ 6**

Í lov nr. 370 af 21. december 1938 for Færøerne om Bekæmpelse af smitsomme Plantesygdomme og Skadedyr, sum broytt við lov nr. 186 af 7. juni 1958 og § 28 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 5 “fra 50 Kr. eller Hæfte” strikað.

**§ 7**

Í lov nr. 288 af 2. september 1939 om ekstraordinære Foranstaltninger til Sikring af Landets Forsyning med nødvendige Varer m.v., sum broytt við midlertidig bestemmelse nr. 33 af 23. oktober 1940, § 3 í løgtingslóg nr. 26 frá 24. februar 1950 og § 15 í lov nr. 186 af 7. Juni 1958, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 5, stk. 1, 1. pkt., verður “, Hæfte” strikað.

**2.** Í § 5, stk. 1, 2. pkt, verður “Hæfte” broytt til: “fængsel indtil 4 måneder”.

**§ 8**

Lov nr. 219 af 1. maj 1940 om skærpet Straf for visse Overtrædelser af Borgerlig Straffelov og om Ændring af Politilovgivningen, sum broytt við lov nr. 206 af 9. maj 1942, fer úr gildi.

**§ 9**

Í lov nr. 177 af 23. juni 1956 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v., sum broytt við kongelig anordning nr. 228 af 20. juni 1959, kongelig anordning nr. 73 af 14. marts 1968, kongelig anordning nr. 151 af 21. marts 1988, § 4 í lov nr. 505 af 12. juni 2009 og § 4 í løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 6, stk. 1, 2. pkt. verður “hæfte” broytt til: “fængsel”.

**2.** Í § 6, stk. 2 verður “hæfte” broytt til: “fængsel indtil 4 måneder”.

**3.** Í § 6, stk. 3, 3. pkt. verður “hæfte” broytt til: “fængsel indtil 4 måneder”.

**4.** Í § 12, stk. 2 verður “hæfte” broytt til: “fængsel”.

**§ 10**

Í lov nr. 27 af 3. februar 1960 om udlevering af lovovertrædere til Finland, Island, Norge og Sverige, sum broytt við lov nr. 251 af 12. juni 1975 og § 35 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 14, 2. pkt. “hæfte” broytt til: “fængsel indtil 4 måneder”.

**§ 11**

Í lov nr. 170 af 16. maj 1962 om nukleare anlæg (atomanlæg), sum sett í gildi fyri Føroyar við kongelig anordning nr. 462 af 2. august 1973, sum broytt við lov nr. 332 af 19. juni 1974, og sett í gildi fyri Føroyar við kongelig anordning nr. 303 af 20. juni 1975, og § 37 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 38, stk. 1, 1. pkt. verður “, hæfte” strikað.

2. Í § 38, stk. 1, 3. pkt. verður “hæfte” broytt til: “fængsel indtil 4 måneder”.

3. Í § 38, stk. 2 verður “hæfte” broytt til: “fængsel indtil 4 måneder”.

4. § 38, stk. 3 verður orðað soleiðis: “*Stk. 3.* Í reglum, sum givnar verða við heimild í hesi lóg, kann ásetast reving við sekt ella fongsul upp til 4 mánaðar fyri brot á reglurnar.”

**§ 12**

Í lov nr. 150 af 24. april 1963 om inddrivelse af underholdsbidrag, sum broytt við lov nr. 280 af 8. juni 1977, og sett í gildi fyri Føroyar við kongelig anordning nr. 471 af 15. september 1981, § 6 í løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017, og § 38 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 verður í § 11, stk. 4 orðað soleiðis:
“*Stk. 4.* Fullgerðin fer fram eftir reglunum um revsing fyri fongsul í upp til 4 mánaðar.”

**§ 13**

Í lov nr. 194 af 8. juni 1966 om tatovering, sum sett í gildi fyri Føroyar við kongelig anordning nr. 351 af 15. august 1967, verður í § 1, stk. 1 “hæfte” broytt til: “fængsel indtil 4 måneder”.

**§ 14**

Í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, sum broytt við løgtingslóg nr. 64 frá 13. juni 1995 og løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, verður í § 25 “varðhaldi” broytt til: “fongsul í upp til 4 mánaðar”.

**§ 15**

Í løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins, sum broytt við løgtingslóg nr. 65 frá 9. juni 1988, løgtingslóg nr. 73 frá 13. juni 1995 og løgtingslóg nr. 28 frá 19. mai 2008, verður í § 18, stk. 4, 2. pkt. “hefti” broytt til: “fongsul í upp til 4 mánaðar”.

**§ 16**

Í lov nr. 289 af 9. juni 1971 om forbud mod forskelsbehandling p.g.a. race m.v., sum broytt við § 42 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 1, stk. 1 “, hæfte” strikað.

**§ 17**

Í lov nr. 332 af 19. juni 1974 om erstatning for atomskader (nukleare skader), sum sett í gildi fyri Føroyar við kongelig anordning nr. 303 af 20. juni 1975, verður § 41, stk. 1 og 2 orðað soleiðis:
“Brot á §§ 26 og 38, stk. 1 og 4, verða revsaði við sekt ella fongsul í upp til 4 mánaðar.
*Stk. 2.* Í reglum, sum givnar verða við heimild í hesi lóg, kann ásetast reving við sekt ella fongsul upp til 4 mánaðar fyri brot á reglurnar.”

**§ 18**

Í løgtingslóg nr. 106 frá 15. november 1984 um útbjóðing v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 6. mai 2016, verður í § 8, stk. 1, 1. pkt. “hefti” broytt til: “fongsli í upp til 4 mánaðar”.

**§ 19**

Í lov nr. 63 af 3. marts 1948 om ydelse af juridisk bistand samt om inkasso- og detektivvirksomhed m.v. jf. lovbekendtgørelse nr. 565 af 28. august 1986, verður í § 5 “, hæfte” strikað.

**§ 20**

Í løgtingslóg nr. 65 frá 9. september 1963 um ferðslu, sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 179 frá 17. desember 2020, verður í § 58, stk. 2-5, og tríggjar staðni í § 58 a, stk. 11 "hefti ella" strikað.

**§ 21**

Í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 14. mai 2008, løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008 og § 47 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 72, stk. 2 og 3 "hefti ella" strikað.

**§ 22**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjalds lógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 4. mai 2021, verður í § 33, stk. 3, 1. og 2. pkt.", hefti" strikað.

**§ 23**

Í løgtingslóg nr. 16 frá 27. januar 1994 um forboð móti handli við Irak verður í § 5, stk. 1 ", hefti" strikað.

**§ 24**

Í løgtingslóg nr. 90 frá 4. juni 1996 um ábyrgd landsstýrisins, sum broytt við løgtingslóg nr. 131 frá 3. desember 1996, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 6, stk. 1, verður ", hefti" strikað.

**2.** Í § 6, stk. 2 verður "hefti" broytt til: "fongsul í upp til 4 mánaðar".

**§ 25**

Í løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 15. mai 2014, løgtingslóg nr. 52 frá 26. mai 2010 og løgtingslóg nr. 67 frá 29. mai 2017, verður í § 45, stk. 1 og 3 "hefti" broytt til: "fongsul í upp til 4 mánaðar".

**§ 26**

Í løgtingslóg nr. 63 frá 3. juli 1998 um manning av skipum, sum broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 19. mai 2008, § 7 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, løgtingslóg nr. 71 frá 30. mai 2011, løgtingslóg nr. 52 frá 12. mai 2015 og løgtingslóg nr. 51 frá 7. mai 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 25, stk. 1, verður ", hefti" strikað.

**2.** Í § 25, stk. 2 verður "hefti ella" strikað.

**3.** Í § 25, stk. 5, 1. pkt. verður ", hefti" strikað.

**4.** Í § 25, stk. 5, 2. pkt. verður "hefti ella" strikað.

**§ 27**

Í løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, sum broytt við § 18 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 40 frá 13. mai 2013, løgtingslóg nr. 52 frá 4. mai 2017 og § 55 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 64, stk. 1 ", hefti" strikað.

**§ 28**

Í løgtingslóg nr. 88 frá 28. november 2002 um handilstiltøk mótvegis Liberiu, verður í § 3, stk. 1 ", hefti" strikað.

**§ 29**

Í løgtingslóg nr. 89 frá 28. november 2002 um handilstiltøk mótvegis Sierra Leona verður í § 2, stk. 1 ", hefti" strikað.

**§ 30**

Í løgtingslóg nr. 34 frá 18. mars 2003 um umsjón, váttanarveitan, og eftirlit

samsvarandi Sáttmála Sameindu Tjóða um at banna evnafrøðiligum vápnum verður í § 9, stk. 1 ", hefti" strikað.

**§ 31**

Í løgtingslóg nr. 72 frá 16. november 2004 um handilstiltøk mótvegis Somaliu verður í § 2, stk. 1 ", hefti" strikað.

**§ 32**

Í løgtingslóg nr. 85 frá 20. desember 2004 um forboð móti ávísum dopingevnum, sum broytt við § 59 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 4, stk. 1 ", hefti" strikað.

**§ 33**

Í løgtingslóg nr. 92 frá 21. desember 2004 um vernd av fornlutum í havinum verður í § 7, stk. 2 "hefti ella" strikað.

**§ 34**

Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (Barnaverndarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 26. mars 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 73 verður "hefti" broytt til: "fongsli".

**2.** Í § 74, stk. 1 verður "hefti" broytt til: "fongsli".

**3.** Í § 75, stk. 1 verður "hefti ella" strikað.

**§ 35**

Í løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum (Ílegulógin), sum broytt við kunngerð nr. 12 frá 31. mars 2008, verður í § 12, stk. 1 ", hefti" strikað.

**§ 36**

Í løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2007, verður í § 53, stk. 1 og 2 "hefti" broytt til: "fongsul í upp til 4 mánaðar".

**§ 37**

Í løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 2007 um spreingievni og spreingiarbeiði v.m., sum broytt við § 62 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 20, stk. 1 verður ", hefti " strikað.

**2.** Í § 20, stk. 2 verður "hefti ella" strikað.

**3.** Í § 21 verður "hefti" broytt til: "fongsli í upp til 4 mánaðar".

**§ 38**

Í løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um kavaravinnu og kavaraútgerð, sum broytt við § 64 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 21, stk. 1, verður ", hefti" strikað.

**2.** Í § 21, stk. 2, verður "hefti ella" strikað.

**3.** Í § 22 verður "hefti" broytt til: "fongsli í upp til 4 mánaðar".

**§ 39**

Í løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 20. november 2007, § 10 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012 og løgtingslóg nr. 184 frá 21. desember 2018, verður í § 23, stk. 1 og 2 "hefti" broytt til: "fongsli í upp til 4 mánaðar".

**§ 40**

Í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 24. februar 2021, verður í § 28, stk. 3 ", hefti" strikað.

**§ 41**

Í løgtingslóg nr. 21 frá 16. mars 2012 um havnaloðsing (Loðslógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 143 frá 18. desember 2013, løgtingslóg nr. 65 frá 29. mai 2017, løgtingslóg nr. 63 frá 9. mai 2019 og § 68 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 19, stk. 4 "hefti ella" strikað.

**§ 42**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Danski tvíteksturin í hesum lógum verður strikaður:
1) Lagtingslov nr. 48 af 9. juli 1970 om naturfredning.
2) Lagtingslov nr. 31 af 5. juli 1971 om landets tjenestemænd.
3) Lagtingslov nr. 106 af 15. november 1984 om licitation m.v.
4) Løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu.
5) Lagtingslov nr. 136 af 8. september 1992 om meromsætningsafgift.
6) Lagtingslov nr. 16 af 27. januar 1994 om forbud mod handel med Irak.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Landsstýrið hevur lagt fyri Løgtingið ríkislógartilmæli um at seta nýggja revsifullgerðarlóg í gildi fyri Føroyar.

Í hesum sambandi verður høvi nýtt at leggja fram lógaruppskot um broyting í ymsum lógum um revsing sum fylgi av hesi lóg og broytingum áður av galdandi lóggávu um revsing, serliga avtøkuna í Føroyum av heftisrevsing í 2010. Tá var hesin revsingarformur avtikin uttan at gera neyðugu konsekvensbroytingar í øðrum lógum. Tað verður nú gjørt.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Heftisrevsing var innførd við borgerlig straffelov, lov nr. 126 af 15. april 1930 § 44. Hetta var ein mildari formur at halda fólk handan rimarnar enn verulig fongsling. Revsingin var " tiltænkt personer, der står uden for de egentlige forbryderes kreds". Hefti kundi dømast frá 7 døgum til 6 mánaðir.

Tann, sum var dømdur hefti, hevði eftir § 44 stk. 2 í revsilógini rætt at hava mat við sær í fongsli afturat vanliga kostinum har og kundi hava ymisk persónlig ting við sær inn at sita - eitt nú til at fríðka um fongsulsklivan. Eftir stk. 3 hevði hann eisini rætt at fáast við egið arbeiðið og fáa inntøkuna av tí. Hann hevði rætt til at sita burturfrá vanligum fangum og bara saman við øðrum heftisdømdum. Um hann ikki hevði nakað arbeiðið at taka sær til, kundi tað bert áleggjast honum at arbeiða, um tað var samsvarandi hansara "dannelsestrin og livsstilling".

Við lov nr. 433 af 31. maj 2000 om ændring af forskellige lovbestemmelser i forbindelse med gennemførelsen af en lov om fuldbyrdelse af straf m.v. var heftisrevsing avtikin í Danmark. Hendan avtøkan av heftisrevsing var sett í gildi í Føroyum við anordning nr. 1139 af 4. december 2009. har tað í § 2 verður sagt:

*"Stk. 1. Anordningen træder i kraft den 1. januar 2010.*
*Stk. 2. Hvis der efter anordningens ikrafttræden skal idømmes straf for en tidligere begået overtrædelse, for hvilken hæfte indtil 30 dage ville være forskyldt, idømmes fængsel med samme antal dage som hæfte.*
*Stk. 3. Ville højere straf end nævnt i stk. 2 være forskyldt, kan en lavere straf af fængsel idømmes, dog ikke mindre end 30 dage eller mere end 4 måneder.*
*Stk. 4. Efter anordningens ikrafttræden kan der ikke idømmes hæftestraf, selv om straffebestemmelser i anden lovgivning fortsat giver mulighed herfor.*
*Stk. 5. Ved anvendelse af straffebestemmelser, hvor hæfte indgår i strafferammen, kan der i stedet for hæfte idømmes fængsel indtil 4 måneder. Stk. 2 og 3 finder tilsvarende anvendelse.*
*Stk. 6. Ved fastsættelse af forvandlingsstraf for bøde vedrørende en lovovertrædelse, der er begået før lovens ikrafttræden, finder stk. 2 og 3 tilsvarende anvendelse.*
*Stk. 7. Loven har ikke virkning for hæftestraf eller forvandlingsstraf af hæfte, som er idømt eller fastsat før lovens ikrafttræden."*

Á málsøkjum, sum eru føroysk sermál, eru tað 41 lógir, sum hava ásetingar um heftisrevsing. Í klombrum verður víst til greinina í lógaruppskotinum, sum broytir lógina.

*Á málsøkinum hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum:*
Løgtingslóg nr. 16 frá 27. januar 1994 um forboð móti handli við Irak (§ 23)
Løgtingslóg nr. 88 frá 28. november 2002 um handilstiltøk mótvegis Liberiu (§ 28)
Løgtingslóg nr. 89 frá 28. november 2002 um handilstiltøk mótvegis Sierra Leona (§ 29)
Løgtingslóg nr. 34 frá 18. mars 2003 um umsjón, váttanarveitan, og eftirlit samsvarandi Sáttmála Sameindu Tjóða um at banna evnafrøðiligum vápnum (§ 30)
Løgtingslóg nr. 72 frá 16. november 2004 um handilstiltøk mótvegis Somaliu (§ 31)
Løgtingslóg nr. 92 frá 21. desember 2004 um vernd av fornlutum í havinum (§ 33).

*Á málsøkinum hjá Løgmansskrivstovuni:*
Lov nr. 127 af 15. april 1930 om ikrafttræden af borgerlig straffelov (§ 3)
Lov nr. 139 af 7. maj 1937 om Kontrol med Tilvirkning af Krigsmateriel m.m.(§ 5)
Lov nr. 219 af 1. maj 1940 om skærpet Straf for visse Overtrædelser af Borgerlig Straffelov og om Ændring af Politilovgivningen (§ 8)
Lov nr. 27 af 3. februar 1960 om udlevering af lovovertrædere til Finland, Island, Norge og Sverige (§ 10),
Lov nr. 194 af 8. juni 1966 om tatovering (§ 13)
Lov nr. 289 af 9. juni 1971 om forbud mod forskelsbehandling p.g.a. race m.v. (§ 16)
Lovbekendtgørelse nr. 565 af 28. august 1986 om ydelse af juridisk bistand samt om inkasso- og detektivvirksomhed m.v. (§ 19)
Løgtingslóg nr. 90 frá 4. juni 1996 um ábyrgd landsstýrisins (§ 24)
Løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd (§ 36).

*Á málsøkinum hjá vinnu- og umhvørvismálaráðnum:*
Lov nr. 81 af 30. marts 1895 for Færøerne om tilsyn med udvandreres befordring. (§ 1)
Lov nr. 49 af 24. marts 1899 om Strandingslov for Færøerne (§ 2)
Anordning nr. 49 af 19. februar 1934 for Færøerne om Gifte og andre for Sundheden farlige Stoffer (§ 4)
Lov nr. 370 af 21. december 1938 for Færøerne om Bekæmpelse af smitsomme Plantesygdomme og Skadedyr (§ 6)
Lov nr. 288 af 2. september 1939 om ekstraordinære Foranstaltninger til Sikring af Landets Forsyning med nødvendige Varer m.v., (§ 7)
Lov nr. 170 af 16. maj 1962 om nukleare anlæg (atomanlæg) (§ 11)
Løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing (§ 14).
Lov nr. 332 af 19. juni 1974 om erstatning for atomskader (nukleare skader) (§ 17)
Løgtingslóg nr. 106 frá 15. november 1984 um útbjóðing v.m. (§ 18)
Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd (§ 21)
Løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi (§ 25)
Løgtingslóg nr. 63 frá 3. juli 1998 um manning av skipum (§ 26)
Løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi (§ 27)
Løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 2007 um spreingievni og spreingiarbeiði v.m. (§ 37)
Løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um kavaravinnu og kavaraútgerð (§ 38)
Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (§ 39)
Løgtingslóg nr. 21 frá 16. mars 2012 um havnaloðsing (§ 41)

*Á málsøkinum hjá Fíggjarmálaráðnum:*
Løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins (§ 15)
Løgtingslóg nr. 65 frá 9. september 1963 um ferðslu, sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 (§ 20)

Løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (§ 22)
Løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum (§ 40)

*Á málsøkinum hjá Almannamálaráðnum:*
Lov nr. 177 af 23. juni 1956 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v. (§ 9)
Lov nr. 150 af 24. april 1963 om inddrivelse af underholdsbidrag (§ 12).
Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (§ 34).

*Á málsøkinum hjá Heilsumálaráðnum:*
Løgtingslóg nr. 85 frá 20. desember 2004 um forboð móti ávísum dopingevnum (§ 32).
Løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum (§ 35).

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Innihaldsliga broytir uppskotið ikki galdandi lóggávu í Føroyum.

Heftisrevsing var avtikin í 2010 í Føroyum, men stóð framvegis í fleiri serlógum. Tekniskt valdi man so loysnina at áseta avtøkuna í revsilógini, og so tulkingarliga siga at hendan revsilógarbroyting í roynd og veru broytti allar serlógirnar har heftisrevsing var ásett, men man gjørdi tað ikki við einari formligari broyting í einstøku lógunum.

Við hesum uppskotinum roynir man so at snøgga um lóggávuna, so at hon svarar til tað, sum veruliga geldur, nevniliga at heftisrevsing er ikki til longur.

Tað verður í fleiri serlógum, bæði innan sermál og felagsmál, ásett, at heftisrevsing er heimilað.

Við hesum uppskotinum verða fylgibroytingar gjørdar í lógum, sum eru føroysk sermál. Fylgibroytingar í lógum, sum eru felagsmál, mugu verða gjørdar við serstakum uppskoti sum ríkislógartilmæli.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Neyðugar fylgibroytingar í 40 serlógum á teimum málsøkjum, sum føroyskir myndugleikar hava málsræði á, í samband við at heftisrevsing er tikin av.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið verður sent til ummælis hjá:

- Almannamálaráðnum,
- Heilsumálaráðnum,
- Uttanríkis- og mentamálaráðnum,
- Umhvørvis- og vinnumálaráðnum,
- Fiskimálaráðnum,
- Fíggjarmálaráðnum,
- Føroya rætti,
- Føroya landfúta og
- Kommunufelagnum.

*Ummæli er komið frá .......*

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur, heruppií ríkismyndugleikar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Tó so at fyri teir myndugleikar, sum umsita lógirnar, verður arbeiðið lættari, tá ið heftisásetingarnar nú verða strikaðar, soleiðis at veruliga rættarstøðan framgongur av einstøku lógini.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagskapir. Tó so at fyri tey, sum brúka og umsita lógirnar, verður arbeiðið lættari, tá ið heftisásetingarnar nú verða strikaðar, soleiðis at veruliga rættarstøðan framgongur av einstøku lógini.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á hesum økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, sum Føroyar hava skyldu at fylgja. Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið er ikki í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS, ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

### 2.9. Markaforðingar

Tað eru ongar kendar markaforðingar, og lógaruppskotið elvir ikki til nýggjar markaforðingar, av tí at talan er fylgibroytingar í samband við gildiskomu av nýggjari revsifullgerðarlóg, t.e. Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf m.v.

### 1.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting ella onnur størri inntriv.

### 2.11. Skattir og avgjøld

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

### 2.12. Gjøld

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki nýggjar skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Nei.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til §§ 1-7 og §§ 9-41**

Í hesum 40 serlógunum innan sermál verða heftisrevsingar ásettar. Tann ókunnugi við revsilógarbroytingini frá 2010, kann halda, at heftisrevsing stendur við og tað verður tí rættað. Antin avtikin so at bara verður víst til fongsul, ella umroknað til fonguslsrevsing upp í 4 mánaðar.

**Til § 3**
Lov nr. 127 af 15. april 1930 om ikrafttræden af borgerlig straffelov (Ikrafttrædelsesloven) er frá 1930, og tí eru nakrar greinir í lógini í dag óviðkomandi.

Í §§ 5, 10, 19 og 20 í Ikrafttrædelsesloven eru ymiskar skiftisreglur í samband við, at lógin kom í gildi 1. januar 1933. Hesar ásetingar hava ongan veruligan týdning í dag, og tí verða tær formliga strikaðar, tá nú broyting verður gjørd í lógini viðvíkjandi heftirevsing.

**Til § 8**

Nevnda lóg var kunngjørd í Dimmalætting 29. november 1952 at galda í Føroyum. Av skilhaldsgrundum verður lógin nú tilmælt strikað. Hon er nú uttan týdning, tí at hon var gjørd vegna krígsumstøðurnar undir seinna heimsbardaga. Lógin er longu tikin av í Danmark við § 107 í lóg nr 538 frá 8. juni 2006. Kemur kríggj aftur í Føroyum, ger gps-tøknin og varmasøkjandi myndatól, at tað fer ikki longur at verða myrkalagt.

**Til § 42**

*Til stk. 1*
Innihaldsliga ger uppskotið onga broyting í rættarstøðuni og er gildiskomudagurin tí settur til at verða dagin eftir, at løgtingslógin er kunngjørd.

*Til stk. 2*
Danski tvíteksturin í nevndu lógum verður strikaður, so sum tilmælt er í nr. 2.1.8 í rundskrivi um lógarsmíð frá januar 2019.

Løgmansskrivstovan, xxxxx 2021

**Bárður á Steig Nielsen**
løgmaður

/ John Rajani

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Almannamálaráðnum.
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Fíggjarmálaráðnum.
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Fiskimálaráðnum.
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Umhvørvis - og vinnumálaráðnum.
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum.
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Føroya Landfúta.
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Føroya rætti
Fylgiskjal 10: Ummæli frá Kommunufelagnum